Nr. 3

24. januar 1994

# Rundskriv

## um inn- og útskriving fólkaskúlans

Við heimild í § 45, 3. stk. í løgtingslóg um fólkaskúlan ásetur Landsskúlaráðið hesar reglur um inn- og útskriving fólkaskúlans.

### I. Innskriving

#### a. Innskriving í grundskúlan

**§ 1.** Innskriving fer fram fyri 1. februar í tí árinum, skúlaárið byrjar.
*2. stk.* Sjúka ella aðrar serligar umstøður kunnu gera, at innskrivingin kann verða seinni.
*3. stk.* Ábyrgdina av, at barn í undirvísingarskyldugum aldri verður innskrivað í fólkaskúlan, hevur tann, ið fyri húskinum stendur, ella tann, ið hevur foreldramyndugleikan yvir barninum.

**§ 2.** Skúlanevndin hevur eftirlit við, at øll børn í undirvísingarskyldugum aldri, sum eru skrásett í fólkayvirlitinum í kommununi, og sum ikki fáa aðra líkinda undirvísing, verða innskrivað í fólkaskúlan í tí kommunu, har barnið býr ella hevur tilhald.
*2. stk.* Biðja foreldrini ikki sjálv um innskriving smb. § 45 í fólkaskúlalógini, verður skúlanevndin at skipa fyri, at barnið verður innskrivað (smbr. tó § 4).
*3. stk.* Reglurnar í 1. og 2. stk. fata eisini um børn, sum fyribils halda til í aðrari kommunu í minsta lagi 2 vikur umframt frítíðir, uttan at tey tó siga frá teirra fyribils bústaði, og tí enn eru skrásett í fólkayvirlitinum í bústaðarkommununi.

**§ 3.** Skúlanevndin útvegar neyðugar upplýsingar frá fólkayvirlitinum um øll børn í kommununi/skúlasamtakinum, sum í álmanakkaárinum verða 7-14 ár smb. § 43 í fólkaskúlalógini.
*2. stk.* Fráboðan um barn, sum flytur til Føroya, eigur at verða skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 3 vikur, eftir at fólkayvirlitið hevur fingið fráboðan.

**§ 4.** Skúlanevndin tekur avgerð um upptøku í skúlan av børnum, sum enn ikki hava undirvísingarskyldu smb. § 43 í fólkaskúlalógini.

**§ 5.** Skúlanevndin/skúlin lýsir hvørt ár, nær og hvar innskrivingin í 1. flokk fer fram, og hvørjar upplýsingar skúlin skal hava um barnið.
*2. stk.* Í lýsingini eigur at verða tilskilað, at barnið aftan á innskrivingina, men áðrenn skúlagongdin byrjar, møguliga verður flutt í annan skúla, um hetta skuldi gjørst neyðugt vegna umlegging av upptøkuøki skúlanna.

#### b. Innskriving í framhaldsskúlan

**§ 6.** Innskriving/endurinnskriving av næmingi í framhaldsskúla smb. § 3, 1. stk. í fólkaskúlalógini fer somuleiðis fram fyri 1. februar í tí árinum, skúlaárið byrjar.
*2. stk.* Sjúka ella aðrar serligar umstøður kunnu gera, at innskrivingin/endurinnskrivingin kann verða seinni.
*3. stk.* Ábyrgdina av, at næmingur verður innskrivaður/endurinnskrivaður í framhaldsskúla, hevur tann, ið fyri húskinum stendur, ella tann, ið hevur foreldramyndugleikan yvir næminginum.
*4. stk.* Skúlamyndugleikarnir á staðnum kunnu taka støðu til, at eisini næmingar, ið eru eldri enn 18 ár, kunnu verða innskrivaðir/endurinnskrivaður í framhaldsskúlan (smbr. § 27, 3. stk.).

*5. stk.* Tær skyldur, ið eru galdandi fyri næmingar í undirvísingarskyldugum aldri, eru somuleiðis galdandi fyri næmingar, sum eru innskrivaðir í framhaldsskúlan (smbr. § 46.)

**II Útskriving**

**§ 7.** Næmingur verður útskrivaður úr skúlanum:

1) um hann fyribils í minst tvær vikur flytur í annan skúla í kommununi ella flytur í aðra kommunu
2) um hann flytur í aðra kommunu ella flytur av landinum
3) um váttan er fyri, at næmingurin fær heimaundirvísing
4) um avgerðir eftir § 28 í fólkaskúlalógini verða tiknar næminginum viðvíkjandi
5) tá ið undirvísingarskyldan endar
6) um foreldur/verji at næmingi, ið er farin um undirvísingarskyldugan aldur, ynskja, at næmingurin verður útskrivaður
7) við endan av 9. ella 10. flokki
8) um næmingurin er innskrivaður eftir § 27, 3. stk. í fólkaskúlalógini og ikki røkir skyldur sínar mótvegis skúlanum.

**§ 8.** Næmingur í undirvísingarskyldugum aldri kann bert útskrivast, um trygd er fyri, at hann fær lógarásett undirvísingartilboð.
*2. stk.* Næmingur, ið verður undirvístur á sjúkrahúsi ella heima vegna sjúku, verður ikki útskrivaður úr skúlanum, uttan so er, at treytirnar í 1. stk. eru loknar.
*3. stk.* Næmingur, ið er farin um undirvísingarskyldugan aldur, men sum ikki er myndugur, kann tó útskrivast eftir áheitan frá foreldrum/verja.

**§ 9.** Næmingur, sum er myndugur, kann sjálvur biðja um at verða útskrivaður.

**§ 10.** Um næmingur verður útskrivaður til undirvísing í øðrum skúla/undirvísingarstovni, skal skúlaleiðslan skipa fyri, at flytingarblað, ið skal hava hesar upplýsingar, verður skrivað:

1. Navn næmingsins, aldur og bústað
2. Nøvn foreldra (verja) aldur og verandi bústað
3. Verandi skúla næmingsins og flokk
4. Komandi skúla næmingsins, um hann er kendur
5. Nær skúlagongdin er byrjað
6. Útskrivingardagfesting
7. Upplýsing um serundirvísing
8. Upplýsing um heilsustøðu

*2. stk.* Flytingarblaðið verður sent leiðaranum í tí skúla ella stovni, har næmingurin skal hava undirvísing. Um skúli/stovnur ikki er kendur, skal flytingarblaðið sendast skúlanevndini í bústaðarkommununi ella skúlamyndugleikanum á tilflytingarstaðnum.
*3. stk.* Makaskjal av flytingarblaðnum verður latið foreldrunum.

**§ 11.** Tá ið næmingur verður útskrivaður til undirvísing í øðrum skúla/undirvísingarstovni, skipar skúlaleiðslan fyri, at næmingamappan, ið skal hava hesar upplýsingar, verður send móttakandi skúla/stovni:

1. Ávísing til serundirvísing ella annan sernámsfrøðiligan stuðul
2. Nágreiniligar upplýsingar um heilsustøðu, tannlæknaviðgerð o.a.
3. Lærubøkur (grundbøkur), sum næmingurin hevur nýtt í ymsu lærugreinunum
4. Vallærugreinir, sum næmingurin hevur valt, og tímatal teirra.
5. Støðumet, sum seinast eru givin fyri hvørja av royndarlærugreinunum, og møgulig fráfaringarroyndarmet.
6. Møgulig undantøka frá undirvísing.

**§ 12.** Fær ein skúli/stovnur ella skúlamyndugleiki ein flytiseðil fyri næming, sum verður sagdur at vera fluttur í kommununa, men sum ikki er tilmeldaður fólkayvirlitið í kommununi, og um foreldur/verji ikki, áðrenn 2 vikur eru farnar, síðan flytiseðilin var dagfestur, hava vent sær til skúla/stovn ella skúlamyndugleika, so verður flytiseðilin sendur aftur til fráflytingarkommununa.

**§ 13.** Tá ið næmingur verður útskrivaður úr grundskúla ella framhaldsskúla, verður fráfaringarskjal skrivað. Fráfaringarskjal úr 7. árgangi verður tó ikki latið næmingi, sum verður innskrivaður í framhaldsskúlan.

**§ 14.** Hetta rundskriv kemur í gildi 1. august 1994.

Landsskúlafyrisitingin, 16. februar 1994

Hensar Ellingsgaard

/ Petur J. Sigvardsen